Søljan-VÍF 22-30:

# VÍF heldur kósini

Ein hondbóltsdystur varð leiktur á Giljanesi mikukvøldið, har Søljan tók ímóti VÍF.

Endaliga úrslitið av dystinum gjørdist ein 30-22 sigur til gestirnar, og sum skilst, so hevði VÍF ikki stórvegis trupulleikar av dystinum. Longu í fyrra hálvleiki var hampuliga stórur munur millum liðini, og tá VÍF so eisini fór at ansa sær eftir Nicoletu Radu, steðgaði at kalla alt upp hjá Søljuni.

Við sigrinum heldur VÍF framvegis fast í frástøðuni upp til hini bæði oddaliðini, Stjørnuna og VB, og einki er at ivast, at tey í Vestmanna fara at fylgja spent við, tá júst tey bæði oddaliðini hittast um vikuskiftið.

**-jm**

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Neistin | 84 (17) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 75 (22) |
| Ioana Rápa | VÍF | 63 (14) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 58 (17) |
| Milica Ergic | StÍF | 54 (8) |
| Gurið Mortensen | VB | 53 (6) |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 51 |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 48 (9) |
| Nicoleta Radu | Søljan | 44 (7) |
| Katarina Stepanovic | Stjørnan | 44 (11) |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 43 (10) |
| Lina Andriulyte | Neistin | 42 |
| Ann Mari Vang | Kyndil | 41 (8) |
| Irina Rodevici | VÍF | 40 |
| Rannvá Augustinussen | VB 39 | |

**Menn**

| | | |
|---|---|---|
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 68 (24) |
| Dragisa Stojovic | Neistin | 67 (3) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 66 (6) |
| Blagoje Buha | Neistin | 63 (16) |
| Ingi Olsen | VÍF | 57 (20) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF 50 | |
| Áki Mørk | Neistin | 48 (8) |
| Agnar Joensen | VÍF | 41 (3) |
| Høgni Klein | Kyndil | 38 |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 38 (4) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 37 (16) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 36 |
| Sámal Joensen | VÍF | 36 (5) |
| Henrik Gerster | H71 | 36 (13) |
| Damir Oros | KÍF | 36 (13) |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 10 | 8 - 1 - 1 | 249 | 184 | 65 | 17 |
| 2 VB | 10 | 8 - 0 - 2 | 259 | 180 | 79 | 16 |
| 3 VÍF | 11 | 7 - 1 - 3 | 271 | 236 | 35 | 15 |
| 4 Neistin | 10 | 5 - 1 - 4 | 254 | 222 | 32 | 11 |
| 5 StÍF | 10 | 4 - 1 - 5 | 234 | 257 | -23 | 9 |
| 6 Søljan | 10 | 1 - 0 - 9 | 175 | 244 | -69 | 2 |
| 7 Kyndil | 11 | 1 - 0 - 10 | 173 | 292 | -119 | 2 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 9 | 7 - 1 - 1 | 267 | 241 | 26 | 15 |
| 2 StÍF | 9 | 6 - 0 - 3 | 221 | 208 | 13 | 12 |
| 3 Neistin | 9 | 4 - 2 - 3 | 254 | 235 | 19 | 10 |
| 4 VÍF | 9 | 4 - 1 - 4 | 236 | 220 | 16 | 9 |
| 5 KÍF | 9 | 2 - 1 - 6 | 220 | 261 | -41 | 5 |
| 6 H71 | 9 | 1 - 1 - 7 | 204 | 237 | -33 | 3 |

Kyndil-Neistin 15-26 (6-13):

# Tom grannauppgerð

**Tað var so sum so við spenninginum, tá kvinnurnar hjá Neistanum vunnu sær tvey stig mikukvøldið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað var ikki stórvegis ivi um útfallið, tá havnarfeløgini í kvinnudeildini hittust mikukvøldið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er ikki so langt síðani, at hendan grannauppgerðin fram um aðrar dystir var tann, sum gjørdi av, hvar meistaraheitið í kvinnuhondbólti endaði, men í so máta er nógv broytt seinnu árini.

Neistin, sum í mong ár var einaráðandi í kvinnuhondbóltinum, má í ár roknast sum heimahoyrandi beint undir oddinum, og hjá Kyndli tykist kvinnuhondbóltur ikki at vera nakað, sum tosað verður so hart um í løtuni. Har verður ein roynd gjørd at seta nakrar púra feskar leikarar við, og støðan á stigatalvuni avspeglar eisini, hvussu trupult hetta er, tá øll onnur styrkja sær um leikarar við stinnum útlendskum leikarum.

### Ivaleyst

Tí var heldur ikki væntandi, at Kyndil fór at gera stórvegis við Neistan. Gaman í legði Kyndil seg tíðliga í dystinum á odda við 4-2, men so var eisini liðugt. Kyndil fekk bert tvey mál afturat fyri steðgin, og tá Neistin samstundis skoraði ellivu ferðir, so gjørdist munurin stórur. Og hann kundi enntá verið væl størri, var tað ikki fyri eina sera væl spælandi Fríðu Petersen í grøna málinum, men einsamøll fekk hon tó ikki gjørt tað stóra, fyri at halda liðnum inni í dystinum.

Eftir steðgin helt gongdin sum so bara fram. Tær bláu tóku tað kanska heldur meira róligt, nú leiðslan var somikið trygg, men meira enn at pynta eitt sindur um úrslitið, sluppu tær hjá Kyndli so ikki.

Og so er spurningurin, hvussu nógv longur upp Neistin kann nærkast oddaliðunum. Komandi vikuskifti vitja tær á Giljanesi, har tvey stig ivaleyst bíða eftir teimum, men í seinasta dystinum í grundspælinum skulu tær á útivølli royna seg móti VB, og tað kann í øllum førum gerast tungt.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-Neistin 15-26 (6-13)**

**Málskjúttar**

**Kyndil:** Ann Mari Wang 4(2), Annika Thomsen 3, Hildur Mikkelsen 3, Linda Weihe 1, Sólja Jóanisdóttir 1, Anja Heinadóttir 1, Anita Kjærbo 1, Randi Wardum

**Neistin:** Lina Andriulyte 8, Ása á Neystabø 7(4), Simona Dziugyte 3, Lív Sørensen 3(1), Susan Brockie 3(2), Vivian Unadóttir 1, Marjun Tróndarson 1

**Brotskøst:** Kyndil 2, Neistin 8

**Útvísingar:** Kyndil 6, Neistin 2

**Dómarar úr H71:** Jákup Símun Simonsen & Høgni M. Joensen. Høvdu millum lítið og einki at gera

# EM- landsliðið úttikið

**Føroyska manslandsliðið í flogbólti fer um eina viku til Skotlands, har EM-undankapping er á skránni**

FLOGBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Jesper Brix og Suni Hansen venjarar hjá manslandsliðnum í flogbólti hava nú úttikið teir leikarar, sum skulu umboða Føroyar í EM-undankappingini, sum verður í skotlandi í døgunum 18-22 desember.

Í kappingini eru Føroyar í bólki við Skotlandi, Íslandi og Luxembourg, og skulu tríggir dystir spælast á ferðini.

Kappingin fer fram í Glasgow og leikt verður í Kelvin Hall Int. Arena, og nr. 1 og 2 koma víðari til næsta umfar, sum verður leikt í Luxemburg í mai 2004.

Seinasta vikuskifti í hesum árinum leikar hin bólkurin í undankappingini, og verður hesin bólkurin leiktur í Andorra, við luttøku av Andorra, Kypros, Liktenstein og Írlandi. Eisini tvey lið úr hesum bólkinum koma víðari til endaumfarið.



*Manslandsliðið, sum her sæst royna seg á Guernsey, fer um eina viku til Skotlands*

**Skráin fyri kappingini er annars hendan:**

Fríggjadagin 19.
Føroyar - Ísland
Fríggjadagin 19.
Skotland - Luxemburg
Leygardagin 20.
Ísland - Luxemburg
Leygardagin 20.
Skotland - Føroyar
Sunnudagin 20.
Føroyar - Luxemburg
Sunnudagin 20.
Skotland – Ísland

## Landsliðshópurin

| | |
|---|---|
| Rúni Weihe | BK-Tromsø |
| Bárður Bendis Mikkelsen | Holte IF |
| Suni Juul Petersen | PVC Lyngby |
| Ragnar Petersen í Haraldsstovu | Holte IF |
| Johann Nielsen | Amager VK |
| Steinar Eirikstoft | PVC Lyngby |
| Odd Eliasen | ÍF |
| Jan Áki Olsen | ÍF |
| Bartal Eliasen | ÍF |
| Jens Heri Mortensen | Fram |
| Jóhan Petur á Stongum | SÍ |



# Pedagogur/ hjálparfólk

**til Dagrøktina í Runavíkar Kommunu**

Søkt verður eftir pedagogi/hjálparfólki til Kommunalu Dagrøktina í Runavíkar Kommunu at arbeiða 30 tímar um vikuna, til setan 15. januar 2004, ella eftir avtalu.

Í Dagrøktarskipanini eru 90 børn og 21 dagrøktarmammur.

Vit ynskja at tú:
- hevur hug at arbeiða við børnum
- ert kreativur
- hevur góð samstarvsevnir

Arbeiðið verður í størstan mun at samskipa virksemið í spælistovuni.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá dagrøktarleiðaranum á tlf. 448594 ella á tlf. 228594.

Skrivlig umsókn skal vera Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 30. desember 2003.

RUNAVÍKAR KOMMUNA.

**Dagrøktarskipanin í Runavíkar Kommunu**
Heiðavegur
600 Saltangará




Lesið internet Sosialurin !





Skeiðsdepilin
FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

# Kvinnur sum íbirtarar

Várhálvuna 2004 skipa Skeiðsdepilin og Menningarstovan fyri skeiði sum skal fremja møguleikarnar hjá kvinnum at stovna egna fyritøku. Byrjað verður 28. januar.

**Endamálið við skeiðnum er m.a.:**

- at luttakarar fáa kunnleika til hvussu ein fyritøka verður stovnað og rikin
- at styrkja førleikan hjá luttakaranum at meta um og arbeiða við egnum vinnuhugskotum
- at leiðbeina um, hvar vitan um vinnu fæst,
- at gera eitt samstarvsnet millum kvinnur í Føroyum í somu ella líknandi støðu og millum vinnuhugaðar kvinnur og vinnulívið.

Skeiðið verður lutað sundur í fyrilestrar og uppgávutímar.
Í uppgávutímunum verður dentur lagdur á, at luttakararnir gera virkisætlanir, sum kunnu taka støði í egnum vinnuhugskotum.
Ráðgevi/-ar verða við stóran part av tíðini at hjálpa til og vegleiða tínari ætlan.

Kvinnur, sum hava ætlanir um at fara undir og/ella longu hava egna fyritøku, verða bidnar um at venda sær til Skeiðsdepilin at fáa umsóknarblað um upptøku á skeiðnum.

Fyri at tryggja dyggastu leiðbeining verður í sambandi við umsóknina biðið um stutta frágreiðing um vinnuhugskotið.
Henda verður hildin í trúnaði.

**Kostnaðurin er 4.950 kr.**

Meira um útbúgvingina er á: **www. skeidsdepilin.fo.** Har kanst tú eisini tekna teg til skeiðið.

**Tilmelding: Áðrenn 12. januar 2004.**

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
Tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo

# Limagjaldið fyri 2004

Limagjaldið fyri 2004 hækkar til 600 krónur um kvartali.

Limagjaldið fellur til gjaldingar í ávikavist januar, apríl, juli og oktober ársfjórðingi.

Mint verður á, at møgulig eftirstøða í hesum árinum, eigur at verða goldin áðrenn 31. desember 2003.

**Sjúkrakassi Skála Læknadømis**
490 Strendur · Telefon 449 212 · Telefaks 449 232
T-post adressa: sjkhil@post.olivant.fo

# Kunngerð

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at vallistarnir til løgtingsvalið tann 20. januar 2004 liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð:

**frá fríggjadegnum 12. desember 2003 til tórsdagin 18. desember 2003.**

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan, ella at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 22. desember 2003.

11. desember 2003
Vágs Býráð

# Grundøki í Havn til sølu

Um nóg høgt boð fæst, verður grundøkið **á Skotarók 12**, matr. nr. 1234 h Tórshavn, til støddar 492 $m^2$ selt.

Áhugað kunnu venda sær til

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · Box 359 · FO–110 Tórshavn · Tlf. 311260 · Fax 311261
e-mail: advokatfelagid@kallnet.fo

| | |
|---|---|
| Tormóður Djurhuus, adv. | Jógvan Páll Lassen, adv. |
| Petur Even Djurhuus, adv. | Jógvan E. Ellefsen, adv. |
| Anna Dam, adv. | Ingi Højgaard, adv. |

Sosialurin -tað loysir seg

VESTMANNA KOMMUNA

# Vallistin til løgtingsvalið

Vallistin til løgtingsvalið 20. januar 2004 liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í døgunum frá 12. til 19. desember 2003.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan, ella at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga sendast kommunuskrivstovuni í seinasta lagi 4 dagar eftir, at framløgufreistin er úti.

**Vestmanna kommuna**

W W W . S O S I A L U R I N . F O